

*Tá Sosialurin gjørdi prátið við Ólafur Friðrik Magnusson á Hotel Føroyum í dag, var Sølva Ford eisini til staðar og gav borgarstjóranum í Reykjavík eitt eintakm av nýggjastu fløgu síni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Sølva til mentanarnátt

**Í sambandi við fundin hjá grunninum Nuuk/Reykjavík/Tórshavn, sum hevur verið í Havn seinastu dagarnar, bjóðaði borgarstjórin í Reykjavík Sølvu Ford til mentanarnátt í íslendska høvuðsstaðnum**

**MENTAN**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Nuuk og Tórshavn hava havt eitt mentanarsamstarv síðani 1994, og hetta samstarv varð víðkað í 1997 til eisini at umfata íslendska høvuðsstaðin, Reykjavík.

Borgarstjórarnir í teimum trimum høvuðsstøðunum hittast einaferð um árið, har teir gera av, hvørjum tiltøkum teir stuðla fíggjarliga.

Í gjárkvøldið bjóðaði so borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, til døgurða í Móttøkuhúsunum hjá býráðnum.

Til undirhald var Sølva Ford biðin at syngja, og borgarstjórin í Reykjavík, Ólafur Friðrik Magnusson, gjørdist so imponeraður av henni, at hann bjóðaði henni til Íslands at verða við til mentanarnáttina í Reykjavík, upp á standandi fót.

Talan er í veruleikanum um ein mentanardag, tí byrjað verður longu frá morgunstundini av við Reykjavíkarmaraton, og so verður skipað fyri tiltøkum gjøgnum allan dagin, og hildið verður fram langt út á náttina.

Millum tiltøkini eru tónleikaframførslur, og millum hesar verður so eisini Sølva Ford.

Ein av sangunum verður »As Years Go By« hjá Rolling Stones – tað bað Ólafur Friðrik Magnusson serliga um.

Sosialurin hevur gjørt eina samrøðu við borgarstjóran í Reykjavík sum heldur, at Tórshavn á mangar mátar er ein fyrimynd fyri Reykjavík. Samrøðan verður í Sosialinum í komandi viku.

---

# Klaksvík fær enn eina vitjan

**Í sambandi við 100-ára haldið hjá Klaksvíkar kommunu fær Klaksvík í komandi viku vitjan úr norska vinarbýi teirra, Tróndheimi**

**100 ÁR**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík**: Tað er eingin annar enn kommunustjórin í Mentamálum, Gerhard Dalen, sum kemur á vitjan.

Hann hevur eisini verið leiðari av Tróndheims Symfoniorkestri og er haraftrat kendur sum ein dugnaligur fyrilestrarhaldari.

Ein smakk av hesum fáa fólk hósdagin í komandi, tá Gerhard fer at halda ein fyrilestur, ið hann kallar: “Listarlig prýðing av almenna rúminum!”

– Er hetta ein óneyðug kommunal byrða - ella er tað við til at menna býin?, er ein av spurningunum, sum hann fer at seta í fyrilestri sínum.

### Við uppá ráð

Tróndheim kommuna hevur samtykt, at 1,25 % av íløgukarminum skal fara til listarlig prýði av kommunalum bygningum og almenna býrúminum.

Skipanin hjá kommununi er hon, at listarfólk verða tikin upp á ráð í tilgongdum at velja støð til prýðis, hvat listarligt skal verða lagt eftir – hetta í samráð við arkitektar og býarplanleggjarar.

Ætlanir eru til dømis um at prýða St. Ólavs Sjúkrahúsið fyri 100 mió krónur.

Ynskið hjá kommununi er, at Tróndheim skal verða heimsins størsta uttandura savn fyri nútíðarlist.

Á fyrilesturin verður kunnað í orðum og myndum um skipanir og hvussu langt komið er áleiðis.

### Pílagrímar til Tróndheim

Gerhard Dalen fer somuleiðis at halda ein fyrilestur í Christianskirkjan fríggjakvøldið í næstu viku. Evnið tá ber heitið: Pílagrímsleiðin til Nidarós.

Støðið í fyrilestrinum er tað alsamt vaksandi ynskið hjá fólki at fara á slíkar pílagrímsferðir, og her ætlar Tróndheim at fáa ein avgerandi leiklut.

Við pílagrímsvegin til Santiago de Compostella í Spania stendur eitt vegskelti, har boðað verður frá: Santiago de Compostella 222 km, Roma 2475 km, Jerúsalem 5000 km og at Tróndheim er 5000 km norðureftir.

Ein landsumfatandi verkætlan er farin av bakkastokki, har ætlanin er at seta Nidarós (Tróndheim) og Stiklastaðir í miðdepilin fyri pílagrímsferðum.

Frá 1994 til 1997 bleiv pílagrímsvegurin millum Oslo og Nidarós endurskapaður. Eisini eru pílagrímsvegir gjørdir til og frá Svøríki. Endamálið er at samanbinda pílagrímsarbeiðið tættari móti Santiago de Compostella í Spaniu og Vadstena í Svøríki.

Fyrilesturin kunnar um eina størri satsing av pílagrímsvirksemi í framtíðini í norðurlondum eisini.



*Fleiri pílagrímar leggja leiðina til Tróndheim og vakra Nidaróskatedralin. Í framtíðini er ætlanin at teir skulu gerast enn fleiri. Hetta fáa klaksvíkingar nú møguleika at frætta nærri um*